# STRÍÐSVILJIN VAR MUNURIN




*Vælkoyrandi rumenin hjá EB/Streymi, Sorin Anghel, stútaði hol á B36*

*Mynd: Sofus Johannesen*

**LØGMANSSTEYPIÐ** Sundalagsmenn eru klárir til fjórðu steypafinaluna á rað, eftir at teir vunnu 2-0 á B36 í seinra hálvfinaludystinum. Talan var um ein uppibornan sigur til sundalagsmenn sum vístu sera góðan stríðsvilja, meðan B36 als ikki fekk glið á egið spæl

**Ólavur Øre Hansen**

Ikki kann sigast annað enn at EB/Streymur er steypaliðið fram um onnur. Fjórða árið á rað eru sundalagsmenn komnir í finaluna í kappingini um Løgmanssteypið. Tó metir Egil á Bø ikki, at sundalagsmenn hava ein serstakan frymill, tá talan er um steypakappingina.

– Nei, eg haldi ikki at vit gera nakað ørvísi enn hini liðini. Men tað er sum um vit eru eyka uppsettir, tá talan er um steypadystir, tí tað eru sokallaðir »vinn ella forsvinn« dystir, sigur Egil á Bø.

At sundalagsmenn vóru uppsettir til dystin sást frá fyrsta bríkli, har teir lógu tætt upp at mótspælarunum, so teir ikki fingu tíð ella pláss til at fáa glið á organiseraða álopsspælið. Sambært Egili var hetta uppleggið til dystin.

– Ja, vit lótu tættir á teimum frá dystarbyrjan, sigur Egil, og heldur fram, – at vit vístu sera góðan stríðsvilja allan dystin, har allir mans arbeiddu hart fyri hvørjum øðrum. Tað hevði við sær at B36 als ikki fekk fótin fyri seg í stórum parti av dystinum.



*B36 liðskiparin, Klæmint Matras (22), stríddist sum altíð hart á miðjuni, men sundalagsmenn gjørdu tað sera trupult hjá hvíta árstalsfelagnum at fáa nakað samanhangandi spæl*

*Mynd: Sofus Johannesen*

> Sundalagsmenn kláraðu at seta kílar í uppspælið hjá okkum, og gjørdu tað trupult hjá okkum fáa samanhang í spælið

Liðskiparin hjá B36, Klæmint Matras er samdur við starvsbróðrinum í EB/Streymi.

– Ja, sundalagsmenn kláraðu at seta kílar í uppspælið hjá okkum, og gjørdi tað trupult hjá okkum at fáa samanhang í spælið. Tað var ikki nógv sum riggaði hjá okkum í dystinum, serliga í álopspartinum vóru vit tannleysir, sigur Klæmint Matras.

Samanumtikið var talan um ein arbeiðssigur hjá EB/Streymi. Hóast spælið ikki var tað besta, so